Skráset. nr. 4627

6. roknskaparár

‘12

# Ársfrásøgn



# PARTAFELAGSUPPLÝSINGAR




### Felagið

Betri Pensjón P/F
Kongabrúgvin
Postboks 329
FO 110 Tórshavn
Tel +298 345600
betri@betri.fo
www.betri.fo

Skrás. nr. 4627
6. roknskaparár

### Nevnd

Regin Hammer, nevndarformaður
Heini Joensen
Herálvur Jacobsen

### Stjórn

Mortan Poulsen, stjóri

### Grannskoðan

SPEKT
løggildir grannskoðarar Sp/f

Innanhýsis grannskoðanin í
TF Holding samtakinum

### Ársaðalfundur

Ársaðalfundur verður hildin eftir nærri áseting.



# INNIHALDSYVIRLIT

| | |
|---|---|
| Partafelagsupplýsingar | 2 |
| 5 ára yvirlit | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| Leiðsluátekning | 14 |
| Váttan frá innanhýsis grannskoðanini | 16 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 17 |
| Rakstrarroknskapur | 20 |
| Fíggjarstøða | 21 |
| Eginognsuppgerð | 23 |
| Notur | 24 |



# 5 ÁRA YVIRLIT

| HØVUÐSTØL (KR. 1.000) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 76.963 | 124.007 | 110.459 | 41.954 | 24.984 |
| Útgoldnar veitingar | -8.043 | -8.774 | -6.815 | -754 | -174 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 20.630 | 5.388 | 11.563 | 9.779 | -7.715 |
| Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi | -18.259 | -13.477 | -21.406 | -13.581 | -11.390 |
| Úrslit av endurtrygging | -333 | -328 | -219 | -180 | -368 |
| Tryggingartekniskt úrslit | -4.710 | -9.277 | -16.397 | -12.601 | -11.002 |
| Ársúrslit | -2.479 | -7.082 | -13.091 | -7.182 | -12.759 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt | 371.332 | 304.542 | 183.292 | 68.344 | 21.966 |
| Eginogn í alt | 39.151 | 31.630 | 38.711 | 31.802 | 23.984 |
| Ognir í alt | 415.644 | 339.885 | 228.226 | 108.624 | 65.053 |

## LYKLATØL

| | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váðar** | | | | | |
| Kostnaðir í % av tryggingargjøldum | 23,7% | 10,9% | 19,4% | 32,4% | 45,6% |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 5,5% | 5,7% | 17,4% | 30,2% | 101,3% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 4.806 kr. | 3.985 kr. | 11.401 kr. | 33.700 kr. | 72.479 kr. |
| Kostnaðarúrslit | -4,6% | -4,9% | -16,4% | -29,4% | -100,0% |
| Váðaúrslit | -2,3% | -1,2% | -2,9% | -3,7% | -5,0% |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Ognarkapitalstig | 10,5% | 10,4% | 21,1% | 46,5% | 109,2% |
| Yvirfulnaðarstig | 335,0% | 32,9% | 198,7% | 1.008,9% | - |
| Solvensdekningur | 149,8% | 115,2% | 146,5% | 118,4% | 80,7% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | -8,5% | -24,6% | -63,2% | -42,1% | -51,2% |
| Renting av eginogn eftir skatt | -7,0% | -20,1% | -51,8% | -34,5% | -42,0% |



# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## ÁRIÐ 2012

Betri Pensjón P/F er eitt lívs- og pensjónsfelag, ið selir pensjónsloysnir til føroyska marknaðin. Felagið vendir sær bæði til einstaklingar og feløg og hevur góðar, smidligar loysnir til fakfeløg.

Árið 2012 gjørdist fyrsta árið, har skattur av pensjónum skuldi rindast við inngjaldi. Betri Pensjón P/F gjørdi longu undir viðgerðini av lógaruppskotinum um skatt av pensjónum vart við, at hetta fór at ávirka hugin til sjálvboðið at spara upp til pensjónir. Hetta sæst eisini aftur í tølunum fyri 2012. Hóast hetta hækkaðu trygging-argjøldini fyri 2012. Samlaðu tryggingargjøldini fyri 2012, íroknað innskot og pensjón flutt frá øðrum feløgum, vóru 77,3 mió. kr ímóti 124,3 mió kr í 2011. Tey árligu leypandi tryggingargjøldini vóru 34,7 mió. kr. fyri 2012 ímóti 51,0 mió. kr. fyri 2011. Um samanborið verður við 2011, eftir at skattur á 40% er mótroknaður, hækkaðu tryggingargjøldini við 4,1 mió. kr. ella 13,4%.

Í ársfrásøgnini fyri 2011 varð væntað at 2012 fór at geva eitt hall. Rakstrarúrslitið hjá Betri Pensjón P/F í 2012 eftir skatt varð eitt hall uppá 2,5 mió. kr. ímóti einum halli í 2011 uppá 7,1 mió. kr. Samlaði rakstrarkostnaðurin var uppá 18,3 mió. kr., ímóti 13,5 mió kr í 2011. Vøksturin í rakstrarkostnaðinum stavar frá, at felagið í 2012 hevði størri útreiðslur til sølusamsýningar enn í 2011 og frá øktum KT útreiðslum í sambandi við lógina um skatt av pensjón-um, ið varð samtykt beint fyri árslok í 2011.

Tilgongdin av nýggjum kundum helt fram í 2012. Við árslok vóru 7.521 persónar skrásettir kundar ímóti 3.221 í 2011. Hetta merkir, at umleið 30 % av øllum lønmótakarum í Føroyum eru kundar hjá Betri Pensjón P/F. Tá ið felagið var stovnað, varð málið at hava 1/3 av øll-um føroyskum lønmótakarum innan 7 ár. At náa hesum málinum, nú felagið hevur verið á marknaðinum í góð 5 ár, er sera nøktandi.

Bæði lánsbrøv og partabrøv góvu vinning í 2012, sum annars var merkt av skuldarkreppu í fleiri evru-londum, lægsta vøkstrinum í Kina í 13 ár og stórum fíggjarpolitiskum avbjóðingum í USA. Hóast renturnar vóru sera lágar við ársbyrjan, so góvu lánsbrøv vinning, m.a. tí íleggjarar vóru til reiðar at góðtaka sera lága rentu í býti við tryggleika. Á partabrævamarknaðinum vóru tað serliga átøkini frá miðbankum kring heimin, sum øktu um íløguhugin og tryggjaðu partabrøvunum gott avkast.

## GOTT AVKAST Í 2012

Samlaða avkastið av partabrøvum í 2012 var 10,13%, meðan avkastið av lánsbrøvum var 4,22%. Undan ársskiftinum var stórt trýst á amerikanskar politikarar fyri at finna eina fíggjarpolitiska semju, tí fleiri tíðaravmarkaðar fyribilslógir frá Bush tíðini fóru úr gildi á nýggjárinum. Uttan semju fóru skattahækkingar og fíggjar-politiskar sparingar sjálvvirkandi at verða settar í gildi, og hetta vildi havt neilig árin á tann frammanundan viðbrekna búskapin. Hóast semja varð gjørd í evstu løtu, so fevndi hon ikki um hækk-ing av skuldarloftinum ella langtíðarsparingar á fíggjarlógini, og tí kann støðan á marknaðunum aftur gerast spent í sambandi við samráðingar um hesi viðurskifti. Øll íløguprógvini, sum Betri Pensjón P/F nýtir, góvu vinning í 2012.




## HENDINGAR Í 2012

Serliga tvey óloyst mál hava ávirkað pensjónsmarknaðin í Føroyum: sølan av Føroya Lívstrygging P/F (LÍV) og eftirlønar-reformurin, sum leingi hevur verið ávegis. Verulig gongd kemur ikki á pensjónsuppsparing í Føroyum fyrr enn tað verður gjørt við lógarkravi. Tann sjálvbodna uppsparingin til pensjónsaldur er nærum steðgað upp, helst grundað á broyttar skattareglur.

Á vári 2012 tók BankNordik P/F keypið av LÍV aftur. Farið var undir nýggja roynd at selja LÍV, og nú hava nøkur fakfeløg gjørt avtalu við Vinnumálaráðið um keyp av felagnum. Enn manglar góðkenning frá Tryggingareftirlitinum og frá kappingarmyndug-leikunum.

Betri Pensjón P/F hevur í fleiri førum gjørt vart við, at tað er sera óheppið fyri kappingina, at ognarviðurskiftini hjá LÍV ikki hava verið avklárað. Tí er tað til fyrimunar fyri marknaðarstøðuna, um ognarviðurskiftini hjá LÍV verða endaliga avgreidd.

Uppskot um pensjónslóg, nú nevnd eftirlønarlógin, varð heldur ikki sett í gildi í 2012 sum ætlað, men nýtt uppskot er borið niðan í Løgtingið at koma í gildi 1. januar 2014.

Størsta hendingin í 2012 var, at skattur av pensjónum varð rindaður við inngjaldi. At lógin varð lýst bert eina viku áðrenn árslok 2011, setti stór krøv til KT menning og hevði við sær øktar útreiðslur. Hvør kundi skuldi hava nýggja kontu, har skattaðu pensjónsinngjøldini skuldu setast inn á, men tíðliga á vári 2012 var Betri Pensjón P/F til reiðar at taka ímoti teimum fyrstu skatt-aðu pensjónsinngjøldunum.

Lógin um skatt av pensjónum við inngjald hevði beinleiðis ta ávirkan, at øll arbeiðsgevaragoldin pensjónsinngjøld minkaðu við 40%, meðan tryggingargjøldini til lívs-og óarbeiðsførisveitingar vóru tey somu. Neyðugt var tó í ávísum førum at tillaga veitingar-nar, serstakliga veitingarnar við óarbeiðsføri, til annað grundar-lag, nú hesar skuldu útgjaldast skattafrítt.

Størsta neiliga ávirkanin av lógini um skatt av pensjónum er tó, at tað er sera trupult at fáa sjálvboðin inngjøld til pensjón. Tá ið lógaruppskotið varð lagt fram, bleiv ávarað um, at fólk fóru at halda seg aftur við at spara upp til pensjón, tí tey ikki kendu seg trygg við førda pensjónspolitikkin. Nú fyrsta árið við skatting av pensjónum við inngjaldi er farið afturum, sæst hetta týðiliga aftur í sølutølunum. Eisini hava fleiri, ið hava møguleikan, tikið sína pensjón út.

## FÍGGJARSTØÐAN

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón P/F vaks úr 339,9 mió. kr. til 415,6 mió. kr. í 2012.

Avsetingarnar fyri Unit Link sáttmálar vuksu úr 293,5 mió. kr. til 367,8 mió. kr.

Eginognin var 39,2 mió. kr. við árslok 2012  móti 31,6 mió. kr. í 2011.

## BÝTIÐ AV ÁRSÚRSLITINUM

Nevndin mælir til, at ársúrslitið verður flutt til komandi ár.

## ÚTLIT FYRI 2013

Útlitini fyri 2013 hjá Betri Pensjón P/F eru góð. Tað verður støðugt arbeitt við at náa út til so nógvar kundar sum til ber, og nú ognarviðurskiftini hjá LÍV tykjast avgreidd, kemur marknaðurin at býta seg meira javnt millum tey bæði pensjónsfeløgini, ið eru í Føroyum. Nógvir kundar, serstakliga fakfeløg, hava verið í einari bíðustøðu um teirra pensjónskipan, meðan viðurskiftini hjá LÍV hava verið til umrøðu.

Betri Pensjón P/F fer framhaldandi at bjóða seg fram sum pensjónsfelagið hjá einstaklingum, virkjum og fakfeløgum, og felagið væntar vøkstur í tali av kundum og tryggingargjøldum.

Mett verður, at raksturin hjá Betri Pensjón P/F fer at javnviga í 2013.

## FÍGGJARÚTLITINI FYRI 2013

Tað er sera trupult at meta um gongdina á lánsbrøvum og parta-brøvum komandi árið. Renturnar eru sera lágar, og bendir hetta á varsemi á marknaðinum, samstundis sum partabrævavísitøl fleiri staðni eru á hægsta støði nakrantíð. Tað verður tí avgerandi, hvønn veg búskaparligu lyklatølini peika. Komandi árið verður stórur den-tur lagdur á at finna eina endaliga loysn á fíggjarkreppuni í evru-økinum, og at finna semju um fíggjarpolitikkin í USA. Samstundis verður væl fylgt við gongdini á arbeiðsmarknaðinum, sum er so týðandi fyri búskapargongdina og vøksturin í samfelagnum.

Úti í heimi var 2012 merkt av afturhaldni í privatu nýtsluni. Tí eru brúkaratøl og brúkaraálit týðandi amboð fyri at fáa ábending um gongdina í nýtsluni hjá fólki og harvið eisini um búskapargongd-ina. Miðbankar høvdu stóra ávirkan á marknaðirnar í 2012, og sama kann væntast í 2013.

## HENDINGAR EFTIR ÁRSLOK

Frá degnum fyri fíggjarstøðuna til í dag eru ongar týðandi hendingar farnar fram, sum ávirka metingina av ársfrásøgnini.

## VITANARTILFEINGI

Fyri Betri Pensjón P/F er tað av alstórum týdningi, at starvs-fólk hava høgt vitanarstøði. Øllum starvsfólkum verður tryggjað viðkomandi útbúgving og eftirútbúgving fyri at økja førleikarnar, so felagsins kundum verður veitt hollasta ráðgeving.

## MENNING

Betri Pensjón P/F leggur stóran dent á at betra um kappingarføri við øðrvísi tryggingarproduktum, og tað verður støðugt arbeitt við menning á hesum øki.

## VIRKISGONGDIR

Fyri at tryggja, at allir viðkomandi kundaupplýsingar eru til taks og lætt atkomiligar, verður arbeitt miðvíst við at goyma hesar ravtøkniliga (elektroniskt).

Arbeitt verður miðvíst við at hava eina dagførda og nútímans heimasíðu, so kundin skal rokna heimasíðuna sum besta miðilin at koma í sambandi við felagið. Á heimasíðuni skal kundin finna allar upplýsingar um síni pensjóns- og tryggingarviðurskifti.

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Framhald frá síðu 9

## TØKNIFRØÐI

Stórur dentur verður lagdur á rakstrartrygdina í teimum tøkniligu loysnunum, sum valdar verða. Støðugt verður arbeitt við at styrkja um KT-trygdina, sum er grundað á KT-politikk, sum ásetur tey yvirskipaðu trygdarkrøvini.

Menning og rakstur av kjarnuskipanum eru løgd hjá uttanhýsis veitara. Hetta er gjørt fyri at tryggja framhaldandi menning og rakstrartrygd og eisini við atliti til tilfeingi og kostnað.

## COMPLIANCE OG ÁBYRGD

Fyri at tryggja, at allar leiðreglur, politikkir og reglugerðir verða hildnar, er complianceætlan gjørd. Hon skal tryggja, at greið ætlan fyriliggur viðvíkjandi endurskoðan og eftirmeting av øllum leiðreglum, politikkum og reglugerðum á hvørjum ári.

Stjórnin hevur ábyrgdina av at reglugerð, leiðreglur og politikkir verða fylgd.

Ábyrgdarhavandi av compliance hevur árligar samrøður við viðkomandi starvsfólk fyri at staðfesta, hvørt leiðreglur og politikkir verða fylgd í verki.

Á hvørjum ári ger nevndin eftirmeting av hvørji einstakari reglugerð og leiðreglu, og av øllum politikkum. Staðfest verður um leiðreglur, politikkir ella reglugerðir skulu dagførast. Nevndin fær tilmæli um dagføringar og tekur avgerð.

Sostatt verður tryggjað, at allar reglugerðir, leiðreglur og politikkir hjá felagnum støðugt fylgja ásettum lógarkrøvum, og at eftirlit er við, at hesi verða fylgd í verki.

## ETISKAR REGLUR Í SAMBANDI VIÐ ÍLØGUR

Betri Pensjón P/F setir stór krøv til, hvussu samanspardi peningurin verður umsitin, og hvørji etisk krøv verða sett til íløgurnar. Dagført yvirlit yvir hvørjar fyritøkur eru fevndar av íløguprógvum felagsins, er til skjals á www.sparinvest.dk og www.sparindex.dk.

## STÝRING AV VÁÐA

Betri Pensjón P/F metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava neiliga ávirkan á møguleikar felagsins at røkka síni handilsligu mál. Felagið nýtir væl skipaðar mannagongdir til at stýra váðanum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi yvirskipaðar leiðreglur, sum stjórnin og leiðslan annars alsamt halda eyga við verða hildnar.

***Sí talvur á síðu 11***

Víst verður eisini til Váðafrágreiðingina hjá móðurfelagnum, Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á., sum er at finna á heimasíðuni www.trygging.fo.

## VÁÐAFRAMTÍÐARMYNDIR

Váðaviðurskiftini eru myndað í talvuni niðanfyri. Talvan vísir váðaviðurskiftini undir teimum settu fyritreytunum fyri teir týdningarmestu váðafaktorarnar. Teir settu faktorarnir skulu ikki takast sum væntanirnar hjá Betri Pensjón P/F, men skulu einans takast sum dømi.

| Váðaviðurskifti við ymiskum framtíðarmyndum - tølini eru eftir skatt | Váðamynd | Samlað ávirkan á úrslit (t.kr.) | Broyting í eginogn felagsins |
|---|---|---|---|
| **31. desember 2011** | | | |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | a | -5.466 | -17,3 % |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | b | 4.827 | 15,3 % |
| Partabrøv | c | -1.881 | -5,3 % |
| Fastogn | d | 0 | 0 |
| **31. desember 2012** | | | |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | a | -439 | -1,1 % |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | b | 439 | 1,1 % |
| Partabrøv | c | -1.417 | -3,6 % |
| Fastogn | d | 0 | 0 |

Váðamyndir:
a) Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig
b) Rentulækking uppá 0,7 prosent stig
c) Partabrævalækking á 12 prosent
d) Fall í marknaðarvirðinum á bygningar á 8 prosent

## KAPITALSTYRKI

Niðanfyri er yvirlit, ið vísur kapitalstyrkina hjá Betri Pensjón P/F í mun til tryggingarskyldurnar:

| KR. 1.000 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|
| Eginogn | 39.151 | 31.630 |
| Immateriel ogn | 3.205 | 3.433 |
| Útsett skattaáogn | 0 | 547 |
| Grundarfæfeingi | 35.946 | 27.650 |
| Fæfeingiskrav | 24.000 | 24.000 |
| Kapitalstyrki | 11.946 | 3.650 |

Felagið fekk í 2012 eina kapitalhækking á 10 mió.kr. Hetta hevur betrað kapitalstyrkina hjá felagnum, sum við árslok 2012 var 11,9 mió.kr. í mun til 3,7 mió.kr. við árslok 2011. Mett verður, at felagið hevur neyðugu fíggjarligu styrkina við atliti til galdandi lógarkrøv.

## TALVUR: STÝRING AV VÁÐA

| Marknaðarváðar | | |
|---|---|---|
| **Týdningarmestu váðarnir** | **Val í mun til váðar** | **Váðalækkandi virksemi** |
| Rentuváði<br><br>Partabrævaváði<br><br>Mótpartsváði<br><br>Gjaldførisváði | Yvirskipaða málið við íløguvirksemi felagsins er at fáa sum mest avkast við einum ásettum váðastøði, sum nevndin setur.<br><br>Miðað verður ímóti at hava eina rímuliga spjaðing av íløgunum. | Nevndin í Betri Pensjón P/F hevur samtykt ein íløgupolitikk, sum ásetir karmarnar fyri íløgur felagsins. Íløgupolitikkurin verður dagførdur eftir tørvi ella í minsta lagi einaferð um árið.<br><br>Marknaðarváðin verður avmarkaður við, at felagið grundar sítt virksemi á Unit Link tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan.<br><br>Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í íløguprógv við undirliggjandi lánsbrøvum og partabrøvum.<br><br>Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í tøkum peningi og í íløguprógvum, sum skrásett eru í keypsskálum.<br><br>Mótpartsváðin verður m.a. avmarkaður við at samstarva við íløguumsitarar, sum hava drúgvar royndir og gott orð á sær.<br><br>Tað verður leypandi gjørd frágreiðing um íløgugongdina hjá felagnum. |

| Tryggingarváðar | | |
|---|---|---|
| **Týdningarmestu váðarnir** | **Val í mun til váðar** | **Váðalækkandi virksemi** |
| Livitíð<br><br>Deyðstíttleiki<br><br>Avlamnistíttleika<br><br>Spjaðing | Lønandi virksemi á øllum tryggingarproduktum.<br><br>Váðaspjaðing millum tryggingar- og kundabólkar.<br><br>Avmarkandi úrslitsávirkan frá einstøkum skaðahendingum við endurtrygging. | Felagið brúkar prísásetingaramboð, sum taka hædd fyri váðunum og marknaðarstøðuni.<br><br>Greiðar inntekningarreglur.<br><br>Váðajavning við endurtrygging og við hámørkum fyri ymsum tryggingardekningum.<br><br>Gott dátugrundarlag. |

| Operationellur váði | | |
|---|---|---|
| **Týdningarmestu váðarnir** | **Val í mun til váðar** | **Váðalækkandi virksemi** |
| KT-váðar<br><br>Løgfrøðiligir váðar<br><br>Umsitingarligir váðar<br><br>Svik<br><br>Umdømi<br><br>Strategi | Tað verður ásannað og góðtikið, at ikki slepst heilt undan rakstrarligum váðum, men at hetta støðugt skal avmarkast til støðið, sum nevndin góðtekur | Felagið avmarkar operationellan váða við politikkum, leiðreglum, innaneftirliti og funktiónsskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført.<br><br>Harumframt fylgir felagið neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør.<br><br>Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan. |

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Framhald frá síðu 11

Viðmerkjast skal, at fæfeingiskravið hækkaði pr. 1. januar 2013 frá 3,2 mió. evrum (24.000 t.kr.) til 3,5 mió. evrur (26.250 t.kr.) grundað á lógarbroyting í lóg um tryggingarvirksemi.

## INDIVIDUELLI SOLVENSTØRVUR

Føroysku ásetingarnar um individellan solvenstørv eru meinlíkar teimum í Danmark og eru hesar galdandi, inntil nýggja evropeiska Solvens II ætlandi verður sett í gildi. Individuelli solvenstørvurin ger upp kapitalkravið fyri tryggingarfelagið við grundarlagi í váðunum, felagið hevur. Vegleiðingin hjá Tryggingareftirlitinum ásetir ikki nakran serligan hátt til uppgerðina. Felagið skal sjálvt velja uppgerðarháttin og skal taka støðu til allar týðandi váðar.

Sum fastur táttur í váðastýringini, eyðmerkir og nøgdargreinar nevndin minst eina ferð um árið allar týdningarmiklar váðar hjá felagnum. Fyri hvønn váðabólk verður ásett eitt kapitalkrav, sum nýtt verður í sambandi við uppgerð av individuella solvenstørvinum. Váðametingin er í høvuðsheitinum grundað á politikkir, sum hvørt ár verða viðgjørdir og góðkendir av nevndini. Í uppgerðini av individuella solvenstørvinum tekur Betri Pensjón P/F støði í Solvens II royndarútrokningini QIS5 frá EU.

Individuelli solvenstørvurin hjá Betri Pensjón P/F er 12,2 mió.kr. við árslok 2012. Yvirdekningurin í mun til individuella solvenstørvin var 23,3 mió.kr.

## EIGARAVIÐURSKIFTI

TF Holding P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F og eigur allan partapeningin hjá felagnum.

## LEIÐSLUSTØRV HJÁ NEVND OG STJÓRN

Upplýsingar um onnur leiðslustørv hjá nevnd og stjórn sambært § 129a í Kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

| | |
|---|---|
| **Nevndarformaður:** | **Regin Hammer** |
| Stjóri í: | TF Holding P/F |
| | Tryggingarfelagnum Føroyar P/F. |
| | |
| Nevndarlimur í: | Eik Banki P/F |
| | TF Ognir P/F |
| | TF Íløgur P/F |
| | Faroe Insurance Company Guernsey Ltd. |
| | |
| **Nevndarlimur:** | **Heini Joensen** |
| Nevndarlimur í: | TF Ognir P/F |
| | TF Íløgur P/F |
| | Faroe Insurance Company Guernsey Ltd. |
| | H. N. Jacobsen's Bókahandil P/F |
| | |
| **Nevndarlimur:** | **Herálvur Jacobsen** |
| Nevndarformaður í: | Bókamiðsølan P/F |



# LEIÐSLUÁTEKNING

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 2012 hjá Betri Pensjón P/F.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2012, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2012.

**BETRI PENSJÓN P/F**
Tórshavn, hin 18. mars 2013

**STJÓRN**

Mortan Poulsen, stjóri

**NEVND**

| | | |
|---|---|---|
| Regin Hammer, formaður | Heini Joensen | Herálvur Jacobsen |

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend av ársaðalfundi felagsins

Tórshavn, hin / 2013

fundarstjóri



# VÁTTAN FRÁ INNANHÝSIS GRANNSKOÐANINI

## ÁTEKNING Á ÁRSFRÁSØGNINA

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Betri Pensjón P/F fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2012. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

## FRAMDA GRANNSKOÐANIN

Grannskoðanin er gjørd við støði í kunngerð frá Tryggingareftirlitinum um fremjan av grannskoðan av tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum og í tráð við altjóða standardum um grannskoðan. Hetta krevur, at grannskoðanin verður løgd til rættis og framd á slíkan hátt so grundað vissa fæst fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin er framd í tráð við tað arbeiðsbýtið, sum er avtalað við uttanhýsis grannskoðanina, og hevur fevnt um meting av skipaðum mannagongdum og innanhýsis eftirlitum, heruppií ta váðastýring, sum leiðslan hevur lagt til rættis, og sum er rættað móti frágreiðingartilgongdum og týðandi handilsligum váðum.

Grundað á týdning og váða hava vit við stakroyndum eftirkannað upphæddir og aðrar upplýsingar í ársfrásøgnini. Grannskoðanin hevur eisini framt eina meting av, um tann roknskaparháttur, sum leiðslan hevur valt, er hóskandi, um roknskaparligar metingar hjá leiðsluni eru rímuligar og um hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Vit hava luttikið í grannskoðanini av týðandi og váðakendum økjum, og okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag fyri okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## NIÐURSTØÐA

Okkara fatan er, at skipaðar mannagongdir og innanhýsis eftirlit, íroknað tann váðastýring, sum leiðslan hevur lagt til rættis, ið er rættað móti frágreiðingartilgongdini og týðandi handilsligum váðum, virka á tryggan hátt.

Herumframt er tað okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ogn, skuld, eginogn og fíggjarligu støðu felagsins tann 31. desember 2012 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 2012 í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Tórshavn, hin 18. mars 2013

Petur A. Johannesen
*grannskoðanarleiðari*



# VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## TIL KAPITALEIGARAN Í BETRI PENSJÓN P/F

## ÁTEKNING Á ÁRSFRÁSØGNINA

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Betri Pensjón P/F fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2012 við leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársfrásøgnin er gjørd eftir lóg um tryggingarvirksemi.

## ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV ÁRSFRÁSØGNINI

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársfrásøgnin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um hesir standast av sviki ella mistøkum.

## ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at orða eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum krøvum sambært føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit lúka etisk krøv og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.
Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um hesir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðari innanhýsis eftirlit í huga, ið hevur týdning fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Endamálið við hesum er at leggja grannskoðanina til rættis, soleiðis at hon er hóskandi eftir umstøðunum, men ikki fyri at orða eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin fevnir harumframt um meting av, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.
Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2012 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2012 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Tórshavn, hin 18. mars 2013

SPEKT
**løggildir grannskoðarar SP/F**

Finnbjørn Zachariasen
*statsaut. revisor*

Mirjam Haraldsen
*statsaut. revisor*



↘ Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember
↘ Fíggjarstøða 31. desember
↘ Notur til ársfrásøgnina

# RAKSTRARROKNSKAPUR 1. JANUAR - 31. DESEMBER

Kr. 1.000

| NOTA | | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|
| | **TRYGGINGARGJØLD FYRI EGNA ROKNING** | | |
| 2 | Bruttotryggingarinntøkur | 77.296 | 124.335 |
| | Endurtryggingargjøld | -333 | -328 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **76.963** | **124.007** |
| | **ÍLØGUVIRKSEMI** | | |
| 3 | Rentuinntøkur og vinningsbýti | 9.269 | 6.827 |
| 4 | Virðisjavningar | 10.507 | -1.480 |
| | Rentuútreiðslur | -12 | -181 |
| | Fyrisitingarkostnaður í sambandi við íløguvirksemi | 866 | 222 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **20.630** | **5.388** |
| | **TRYGGINGARVEITINGAR** | | |
| 5 | Útgoldnar veitingar | -15.567 | -3.304 |
| 6 | Broyting í endurgjaldsavsetingum | 7.525 | -5.471 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-8.043** | **-8.774** |
| | **Broyting í avseting til Unit Link sáttmálar** | **-74.314** | **-115.780** |
| | **RAKSTRARKOSTNAÐUR AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | | |
| 7 | Nýtekningarkostnaður | -8.780 | -9.051 |
| 7 | Fyristingarkostnaður | -9.479 | -4.426 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-18.259** | **-13.477** |
| | **Flutt úrslit av íløguvirksemi** | **-1.687** | **-641** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **-4.710** | **-9.277** |
| | **Íløguúrslit av eginognini** | **1.687** | **641** |
| | **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT** | **-3.023** | **-8.636** |
| 8 | **Skattur** | **544** | **1.554** |
| | **ÁRSÚRSLIT** | **-2.479** | **-7.082** |

# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

Kr. 1.000

| NOTA | | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| 9 | **Immateriell ogn** | **3.205** | **3.433** |
| | **Materiell ogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 0 | 0 |
| 10 | **Materiell ogn í alt** | **0** | **0** |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| | Íløguprógv | 31.453 | 24.721 |
| | Innlán í kreditfeløgum | 10.682 | 16.358 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløgur í alt** | **42.135** | **41.079** |
| 11 | **Íløguognir í alt** | **42.135** | **41.079** |
| 12 | **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum** | **367.766** | **293.451** |
| | Áogn hjá tilknýttum fyritøkum | 1.624 | 931 |
| | **Áogn í alt** | **1.624** | **931** |
| | **Aðrar ognir** | | |
| | Aktuell skattaáogn | 462 | 0 |
| 8 | Útsett skattaáogn | 0 | 547 |
| | **Aðrar ognir í alt** | **462** | **547** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 452 | 443 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **452** | **443** |
| | **OGN Í ALT** | **415.644** | **339.885** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

Kr. 1.000

| NOTA | | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|
| | **SKULD** | | |
| | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 50.000 | 47.500 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 35.000 | 27.500 |
| | Flutt úrslit | -45.849 | -43.370 |
| 13 | **Eginogn í alt** | **39.151** | **31.630** |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløgusáttmálar** | | |
| | Endurgjaldsavsetingar | 75 | 1.898 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum | 3.491 | 9.194 |
| | Avsetingar til Unit Link sáttmálar | 367.766 | 293.451 |
| 14 | **Tryggingartekniskar avsetingar í alt** | **371.332** | **304.542** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| 8 | Avsett til útsettan skatt | 575 | 0 |
| | **Avsettar skyldur í alt** | **575** | **0** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í sambandi við trygging | 830 | 894 |
| | Skuld til tilknýttar fyritøkur | 314 | 588 |
| | Annað | 3.443 | 2.231 |
| | **Skuld í alt** | **4.586** | **3.713** |
| | **SKULD Í ALT** | **415.644** | **339.885** |

1 Nýttur roknskaparháttur
15 Eventualskyldur og trygdarveitingar
16 Nærstandandi partar
17 Viðkvæmisgreining av fíggjarognum
18 Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og stað

## EGINOGNSUPPGERÐ

Kr. 1.000

| | Partapeningur | Yvirkursgrunnur | Flutt úrslit | Eginogn |
|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2011** | **47.500** | **27.500** | **-36.288** | **38.712** |
| **Rørslur á eginogn í 2011** | | | | |
| Ársúrslit | | | -7.082 | -7.082 |
| **Eginogn við árslok 2011** | **47.500** | **27.500** | **-43.370** | **31.630** |
| **Eginogn 1. januar 2012** | **47.500** | **27.500** | **-43.370** | **31.630** |
| **Rørslur á eginogn í 2012** | | | | |
| Kapitalhækking | 2.500 | 7.500 | | 10.000 |
| Ársúrslit í tíðarskeiðnum | | | -2.479 | -2.479 |
| **Eginogn við árslok 2012** | **50.000** | **35.000** | **-45.849** | **39.151** |

# NOTUR

Kr. 1.000

## NOTA

1 **Nýttur roknskaparháttur**

### ALMENT

Ársfrásøgnin er gjørd sambært løgtingslóg um tryggingarvirksemi og tilhoyrandi kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr. 2).

Nýttur roknskaparháttur óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2011.

Klassifikatión millum útgoldnar veitingar og broytingar í endurgjaldsavsetingum í rakstrarroknskapinum er broytt í mun til undafarin ár, samberingartøl eru tillagaði hesa broyting. Nevndu broytingar hava onga ávirkan á úrslit ella eginogn felagsins.

**Avrunding av upphæddum**
Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl uttan desimalir. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini**
Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – herímillum tryggingarveitingar og broyting í avsetingum – sum eru við til at røkka ársins inntøku.

**Samtaksviðurskifti og nærstandandi partar**
Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

**Roknskaparligar metingar**
Roknskaparliga virðið á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

**Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan**
Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Leypandi verða transaktiónir í útlendskum gjaldoyra umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

**Rakstrarúrslit**
Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2012 eftir kontributiónsmegin-regluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

### RAKSTRARROKNSKAPURIN

**Tryggingargjøld fyri egna rokning**
Upphæddin fevnir um brutto tryggingarinntøkur javnað fyri latin endurtryggingargjøld.

**Úrslit av íløguvirksemi**
Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevnir um ársins rentuinntøku av innlánum, virðisbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum. Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavning av virðisbrøvum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Tryggingarveitingar**
Goldnar veitingar í árinum, umframt broyting í avsetingum til endurgjøld frádrigið endurtryggjarans part verða innroknaðar sum tryggingarveitingar. Upphæddin fevnir eisini um afturkeyp av tryggingargjøldum og afturberingar av tryggingargjøldum.

**Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi**
Tann parturin av rakstrarkostnaðinum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis kann knýtast at fasthaldan av verandi tryggingum og/ella at nýtekningum, er vístur undir nýtekningarútreiðslum.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um útreiðslur, sum eru nýttar í sambandi við umsiting av verandi tryggingum og av tíðargreinaðum útreiðslum, ið viðvíkja roknskaparárinum.

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**
Fevnir um tann partin av úrslitinum av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

**Skattur**
Skattur av ársúrslitinum er roknaður skattur við 18% við støði í úrsliti áðrenn skatt, tillagað fyri ikki skattskyldugar inntøkur og útreiðslur. Útreiðsluførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti.

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frávikunum, sum stava frá, at inntøkur og útreiðslur ikki verða tiknar við í rakstrarroknskapinum og skattskyldugu inntøkuna í sama tíðarskeiði.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri.

Felagið er samskattað við móðurfelagið, TF Holding P/F. Í tann mun skattlig hall verða nýtt av øðrum feløgum í samskattingini, verður skattavirðið av hallinum goldið tí felagnum, sum letur hallið frá sær.



Kr. 1.000

## NOTA

1 **Framhald, Nýttur roknskaparháttur**

### FÍGGJARSTØÐAN

**Immateriell ogn**
Immateriell støðisogn verður upptikin til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini, tó í mesta lagi í 20 ár.

Nýtt avskrivingartíðarskeið:
Ritbúnaður 5-7 ár

Immateriell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður innroknað til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði.

Kostprísur er útveganarprísur, umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Nýtt avskrivingartíðarskeið:
Innbúgv 3-7 ár
Edv-útgerð 3-7 ár

Materiell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

**Íløguognir**
Virðisbrøv verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning virðissett til dagsvirði. Handlað virðisbrøv verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Dagsvirði av børsskrásettum virðisbrøvum verður gjørt upp við støði í børsskrásetta endakursinum við árslok.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

**Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur**
Avsetingar til Unit Link avtalur fevnir um goldin inngjøld við ískoyti av virðisjavningum og við frádrátti av útgjøldum og fyrisitingarkostnaði.

Avsetingar til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum fevnir um skyldur til at veita bonus og avsláttur av inngoldnum tryggingargjøldum v.m.

Avsetingar til endurgjøld fevnir um fráboðaðar, men ikki útgoldnar tryggingarveitingar. Upphæddini fevnir harumframt um eina meting av tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

**Skuld**
Skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, og hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

**Útsettur skattur**
Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skatta ogn, harundir skattavirðið av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, ognin kann væntast at kunna realiserast fyri.

**Aktuellur skattur**
Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

**Lyklatøl**
Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

Kr. 1.000

| NOTA | | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|
| 2 | **Bruttotryggingarinntøkur** | | |
| | **Leypandi gjøld** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 3.462 | - |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 31.269 | - |
| | **Leypandi gjøld í alt** | **34.731** | **50.995** |
| | **Eingangsgjøld** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 2.739 | - |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 23.448 | - |
| | **Eingangsgjøld í alt** | **26.186** | **63.764** |
| | **Inntøkur frá samlagstryggingum** | **16.379** | **9.575** |
| | | **77.296** | **124.335** |
| | **Herav gjøld** | | |
| | úr Føroyum | 77.296 | 124.335 |
| | úr EU-londum | 0 | 0 |
| | úr øðrum londum | 0 | 0 |
| | | **77.296** | **124.335** |
| | **Tal av tryggjaðum** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 577 | 639 |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 2.815 | 2.515 |
| | Samlagstryggingar | 7.838 | 2.691 |
| 3 | **Rentuinntøkur og vinningsbýti** | | |
| | Rentur av virðisbrøvum, innlánum og útlánum | 66 | 140 |
| | Vinningsbýti frá kapitalpørtum | 9.204 | 6.687 |
| | | **9.269** | **6.827** |
| 4 | **Virðisjavningar** | | |
| | Partabrøv | 7.055 | -7.898 |
| | Lánsbrøv | 3.452 | 6.418 |
| | | **10.507** | **-1.480** |
| 5 | **Útgoldnar veitingar** | | |
| | Eftirløn | -608 | 0 |
| | Tryggingargjøld við deyða | -4.223 | -1.670 |
| | Afturkeyp | -1.621 | -1.634 |
| | Bonus og avsláttur | -9.116 | 0 |
| | | **-15.567** | **-3.304** |



Kr. 1.000

| NOTA | | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|
| 6 | **Broyting í endurgjaldsavsetingum** | | |
| | Avsett endurgjøld | 1.822 | -748 |
| | Avsett til bonus og avsláttur | 5.703 | **-4.723** |
| | | **7.525** | **-5.471** |
| 7 | **Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaðir innihalda** | | |
| | **Starvsfólkakostnað** | | |
| | Lønir | -4.261 | -4.119 |
| | Eftirlønir | -702 | -564 |
| | Aðrir kostnaðir til almannatrygd | -159 | -134 |
| | Lønarhæddaravgjald | -420 | -396 |
| | Aðrir starvsfólkakostnaðir | -380 | -104 |
| | | **-5.922** | **-5.317** |
| | **Løn og samsýning til nevnd og stjórn** | | |
| | Nevndarsamsýning | -36 | -159 |
| | Stjórn | -1.117 | -1.101 |
| | Fulltíðarstørv | **8** | **8** |
| | **Samsýning til grannskoðarar** | | |
| | **SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f** | | |
| | Grannskoðan | -113 | -225 |
| | Aðrar tænastuveitingar | -6 | 0 |
| | **NOTA, løggilt grannskoðanarvirkið P/F** | | |
| | Grannskoðan | 0 | 0 |
| | Aðrar tænastuveitingar | 0 | -44 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar í alt** | **-118** | **-269** |
| 8 | **Skattur** | | |
| | Úrslit áðrenn skatt | -3.023 | -8.636 |
| | **Skattur 18%** | **544** | **1.554** |
| | Skattur í samskatting | 1.666 | 1.010 |
| | Broyting í útsettum skatti | -1.122 | 545 |
| | **Skattur sambært ársfrásøgn** | **544** | **1.554** |
| | Verandi munir | 0 | 0 |
| | **Avstemmað skattaupphædd** | **544** | **1.554** |
| | **Útsettur skattur** | | |
| | Immateriell ogn | -577 | -618 |
| | Rakstrargøgn | 2 | 3 |
| | Framflutt hall | 0 | 1.163 |
| | **Útsettur skattur í alt** | **-575** | **547** |

Kr. 1.000

| NOTA | | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|
| 9 | **Immateriell ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 20.375 | 19.910 |
| | Frágongd í árinum | -11.654 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 401 | 465 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | **9.122** | **20.375** |
| | Avskrivingar 1. januar | -16.942 | -16.369 |
| | Afturførdar avskrivingar | 11.654 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum | -630 | -572 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-5.917** | **-16.942** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **3.205** | **3.433** |
| | **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | **3.433** | **3.540** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **5-7 ár** | **5-7 ár** |
| 10 | **Materiell ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 1.756 | 1.756 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | 1.756 | 1.756 |
| | Avskrivingar 1. januar | -1.756 | -1.750 |
| | Avskrivingar í árinum | 0 | -6 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-1.756** | **-1.756** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **0** | **0** |
| | **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | **0** | **6** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **3-7 ár** | **3-7 ár** |

11 **Útgreinan av íløguognum**

| | **Roknskaparligt virði** | |
|---|---|---|
| | **Ársbyrjan** | **Árslok** |
| Íløguprógv í útlendskum partabrøvum | 11.503 | 11.812 |
| **Íløguprógv í øðrum kapitalpøtum í alt** | **11.503** | **11.812** |
| Íløguprógv í statslánsbrøv | 2.838 | 2.829 |
| Íløguprógv í realkreditlánsbrøv | 10.381 | 14.110 |
| Íløguprógv í virkislánsbrøvum | 0 | 2.701 |
| **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **13.219** | **19.641** |

| | **Netto-íløga** | **Avkast í % áðrenn skatt** |
|---|---|---|
| Íløguprógv í útlendskum partabrøvum | 1.616 | 10,1% |
| **Íløguprógv í øðrum kapitalpøtum í alt** | 1.616 | **10,1%** |
| Íløguprógv í statslánsbrøv | 204 | - |
| Íløguprógv í realkreditlánsbrøv | 1.062 | - |
| Íløguprógv í virkislánsbrøvum | **2.607** | **-** |
| **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **3.873** | **4,2%** |

Kr. 1.000

| NOTA | | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|
| 12 | **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum** | | |
| | **Býti av íløguognum uttan trygd** | | |
| | Partabrøv | 123.732 | 98.446 |
| | Lánsbrøv | 244.034 | 195.006 |
| | **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum í alt** | **367.766** | **293.451** |
| 13 | **Eginogn** | | |
| | **Partapeningur** | | |
| | Partapeningur við ársbyrjan | 47.500 | 47.500 |
| | Hækking í árinum | 2.500 | 0 |
| | | **50.000** | **47.500** |
| | **Yvirkursgrunnur** | | |
| | Yvirkursgrunnur við ársbyrjan | 27.500 | 27.500 |
| | Hækking í árinum | 7.500 | 0 |
| | | **35.000** | **27.500** |
| | **Flutt úrslit** | | |
| | Fluttur úrslit við ársbyrjan | -43.370 | -36.289 |
| | Flutt frá ársúrslitinum | -2.479 | -7.082 |
| | | **-45.849** | **-43.370** |
| | **Eginogn við árslok** | **39.151** | **31.630** |

**Partapeningur**

Samlaði partapeningurin hjá felagnum, er eitt partabræv á 50.000 tkr., ið TF Holding P/F eigur.

| | 2012 | 2011 |
|---|---|---|
| **Grundarfæfeingið og fæfeingiskrav** | | |
| Eginpeningur | 39.151 | 31.630 |
| Immateriell ogn | -3.205 | -3.433 |
| Útsett skattaáogn | 0 | -547 |
| **Grundarfæfeingið** | **35.946** | **27.650** |
| **Fæfeingiskrav** | **24.000** | **24.000** |

Kr. 1.000

| NOTA | | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|
| 14 | **Tryggingartekniskar avsetingar** | | |
| | Avseting við ársbyrjan | 304.542 | 183.292 |
| | Bruttotryggingarinntøkur | 77.296 | 124.335 |
| | Tryggingarveitingar | -15.567 | -3.304 |
| | Rentur v.m. | 18.914 | 5.047 |
| | Umsitingargjald | -6.020 | -1.923 |
| | Váðaúrslit | -7.833 | -2.906 |
| | **Tryggingartekniskar avsetingar við árslok** | **371.332** | **304.542** |
| 15 | **Eventualskyldur og trygdarveitingar** | | |
| | Sum trygd fyri tryggingartekniskar avsetingar eru skrásettar ognir uppá | 409.900 | 334.473 |

Felagið hevur gjørt leigusáttmála við systirfelag í samtakinum, og fevnir hesin sáttmáli um tíðarskeiðið 1. januar 2012 - 31. desember 2017.

Felagið er samskattað við onnur feløg í samtakinum. Samskattaðu feløgini bera tí samábyrgd fyri samlaðu skattaskyldunum.

**16 Nærstandandi partar**

**Nevndu feløg hava týðandi ávirkan á Betri Pensjón P/F**

| Navn og Heimstaður | Grundarlag fyri ávirkan |
|---|---|
| Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á.<br>Kongabrúgvin<br>Postboks 329<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag hjá TF Holding P/F, ger samtaksroknskap. |
| TF Holding P/F<br>Kongabrúgvin<br>Postboks 329<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag |

**Upplýsingar um nærstandandi partar**

Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á. eigur 100% av partabrøvunum í TF Holding P/F.

TF Holding P/F eigur 100% av partabrøvunum í Betri Pensjón P/F og hevur tí avgerandi ávirkan á felagið.

Aðrir nærstandandi partar hjá felagnum eru nevndar- og stjórnarlimir í felagnum og atknýtt feløg, nevndar- og stjórnarlimir í hesum atknýttu feløgunum, umframt nærstandandi persónar hjá áður allýstu persónum.

Undantikið vanliga leiðslusamsýning eru ikki gjørdir aðrir handlar við nevnd, stjórn, leiðarar ellar aðrar nærstandandi partar í farna ári enn tað, ið lýst er niðanfyri.

Samsýning til nevnd og stjórn er víst í notu 7.



Kr. 1.000

**NOTA** 2012 2011

**16 Handlar við nærstandandi partar - framhald**

Felagið keypir tænastur frá móðurfelagnum og systirfeløgum í samtakinum.

Umsitingargjøld til og frá atknýttum feløgum í samtakinum verða avroknað á útreiðslunøktandi støði. Húsaleiga hjá atknýttum feløgum verður avroknað eftir marknaðartreytum.

Avtala er gjørd millum feløgini í samtakinum um renting av millumverandi og er rentan ásett eftir marknaðartreytum. Í árinum eru rentur av millumrokning við atknýtt feløg samlað -12 tkr. (-181 tkr. í 2011). Innistandandi hjá systirfeløgum í samtakinum verða rentað eftir vanligum marknaðartreytum.

| Týðandi samhandlar við atknýtt feløg | 2012 | 2011 |
|---|---|---|
| Húsaleiga | -242 | -198 |
| Tænastu og umsitingargjald til atknýtt feløg | -6.696 | -2.360 |
| **Týðandi samhandlar við atknýtt feløg í alt** | **-6.937** | **-2.558** |

**17 Viðkvæmisgreining av fíggjarognum**

| Hending | Minsta ávirkan á grundarfæfeingið í tkr. |
|---|---|
| Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig | **-439** |
| Rentulækking uppá 0,7 prosent stig | **439** |
| Partabrævalækking á 12 prosent | **-1.417** |
| Ognarprísalækking á 8 prosent | - |
| Valutakursváði (VaR 99,5 prosent) | - |
| Tap uppá mótpartar | - |
| Lækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í óarbeiðstali á 10 prosent | - |

Felagið hevur ikki gjørt avtalu um nakrar samløgubonusskipanir, og tí hava omanfyri nevndu hendingar onga ávirkan á felagið í mun til bonusmøguleikar.

| | Føroyar | Evropa annað | Norður Amerika | Suður Amerika | Japan | Miðeystur | Onnur lond | Ei sundur-greinað | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka | 0,0% | 1,8% | 5,4% | 0,0% | 0,7% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 8,0% |
| Atfeingi | 0,0% | 6,3% | 1,2% | 0,0% | 0,8% | 0,0% | 0,6% | 0,0% | 9,0% |
| Ídnaður | 0,0% | 9,5% | 0,8% | 0,0% | 2,4% | 0,0% | 1,9% | 0,0% | 14,6% |
| Nýstluvørur | 0,0% | 3,3% | 4,8% | 0,0% | 6,1% | 0,0% | 0,6% | 0,0% | 14,8% |
| Brúkaravørur | 0,0% | 5,9% | 4,6% | 0,0% | 1,1% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 11,6% |
| Heilsuviðgerð | 0,0% | 4,1% | 3,2% | 0,0% | 2,0% | 0,2% | 0,0% | 0,0% | 9,5% |
| Fígging | 0,0% | 7,1% | 4,7% | 0,0% | 3,3% | 0,0% | 1,1% | 0,0% | 16,2% |
| KT | 0,0% | 1,9% | 3,9% | 0,0% | 2,6% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 8,4% |
| Fjarsamskifti | 0,0% | 1,0% | 1,9% | 0,0% | 1,6% | 0,1% | 0,2% | 0,0% | 4,8% |
| Veiting | 0,0% | 0,3% | 2,3% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,6% | 0,0% | 3,2% |
| Ei sundurgreinað | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| **Í alt** | **0,0%** | **41,2%** | **32,8%** | **0,0%** | **20,6%** | **0,3%** | **5,1%** | **0,0%** | **100,0%** |

Betri pensjón

Kongabrúgvin
Postboks 329
FO-110 Tórshavn
Tel 345600
www.betri.fo